Fróðskaparsetur Føroya

26. mai 2005

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 5/2005

Tíð: Hósdagin 26. mai 2005, kl. 13.00-15.15

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Eyðfinn Magnussen, varamegindeildarráðsf. fyri NVD
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Eivind Weyhe, megindeildarráðsf. fyri FMD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 4/2005 setursráðsfundi 28. apríl 2005.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarløgtingslóg 2006.** (J.nr. 0015-01595). Tøl komin frá FMD og SSD, NVD ikki komin við neyðuga tilfarinum enn. Setursskrivarin hevur gjørt framrokningar fyri føstu útreiðslurnar. Eitt uppskot til umsókn verður sent ráðslimunum so skjótt alt tilfarið er tøkt. Um freistin at lata umsóknina inn er fyri komandi fund, verður umsóknin at staðfesta millum funda.

4. **Ritgerðin *Far fram á torg* hjá Guðrun Gaard góðkennast til verju á Fróðskaparsetrinum á Ph.D.-stigi.** (J.nr. 0041-00664). Setursráðið tók undir við tilmælinum. Dagurin fyri verjuna verður ásettur at vera 2. september. Setursskrivstovan tekur sær av málinum.

5. **Góðskriving. Føroyamálsdeildin mælir til, at Hanna Jensen fær grundútbúgving í fronskum 120 ECTS, sum hon hevur lokið á Romansk Institut á Keypmannahavnar Universiteti í juni 1999, góðskrivað sum hjánám á tí føroysku útbúgvingini á deildini.** (J.nr. 0046-01614). Spurningurin um, hvat støði krevst til

hjánám, varð umrøddur. Flestu hjánám í Danmark hava skeið frá fyrstu tveimum árunum umframt ein part frá Bachelorárinum. Hanna hevur bachelorútbúgving í fronskum frá Københavns Universitet. Semja um at góðskriva 120 ECTS av samlaðu Bachelor útbúgvingini sum hjánám.

6. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
   a. **Fundur á Føroyamálsdeildini 12.5.05.** (J.nr. 0011-00011). Einki at leggja afturat.
   b. **Fundur á Náttúruvísindadeildini 13.5.05.** (J.nr. 0011-00013). Málið um upptøku av studentum til S/A heystið 2005 varð umrøtt. Einki at leggja afturat.
   c. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 26.5.05.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

7. **Ætlanarskriv millum Høgskulen Stord/Haugesund og Fróðskaparsetrið undirskrivað av báðum rektarunum. At staðfesta.** (J.nr. 0012-01605). Staðfest.

8. **Reglur fyri samsýning av leysalærarum og próvdómarum. At staðfesta.** (J.nr. 0015-01010). Staðfest.

9. **Ársroknskapir 2004. Fróðskaparsetur Føroya sum sjálvsognarstovnur og Grunnur Onnu Djurhuus til áminnis um Sverra Fon. At góðkenna og undirskriva.** (J.nr. 0016-01619 og 0016-01620). Roknskapirnir gjøgnumgingnir, góðkendir og undirskrivaðir á fundinum.

10. **Próvdómaragóðkenning. Eftir tilmæli frá Náttúruvísindadeildini er Mentamálaráðið biðið um at góðkenna Asger Ken Pedersen, docent, dr.scient. á Geologisk Museum, Keypmannahavn sum próvdómara í *Jarðfrøði*. At staðfesta.** (J.nr. 0026-01525). Staðfest.

11. **Innbjóðing til at luttaka við framløgu á MFS-lestrarstevnu 21. juli 2005 "Lesandi – eitt óbrúkt tilfeingi".** (J.nr. 0085-01613). Semja um at tiltakið er áhugavert. Eyðfinn Magnussen átók sær at finna fólk til tiltakið, gevur Setursskrivstovuni boð.

**Kunningarmál:**

12. **Mánaðarjavni ultimo apríl 2005, nýtsla fyri alt setrið 5.688.700 kr. = 29,8% av játtanarkarmi uppá 19.070.000 kr.** (J.nr. 0015-01365).

13. **Listastevna Føroya 2005. Skrá. Tilboð til stovnin um avsláttur til 2 tiltøk: Konsert við Meta Duo tann 7. august og Sirkus Aurelia's Oratorio tann 6. august.** (J.nr. 0013-01617).

14. **NUAS-seminar:**
    a. **Í Uppsala 21.-23.8.05 "Universitetsdirektören i förhållande till styrelsen".** (J.nr. 0014-01615).
    b. **Í Odense 14.-15.11.05 "Det Internationella Universitetet. Konsekvenser och utmaninger/udfordringer".** (J.nr. 0014-01603).

15. **Nevnd undir Norðurlandaráðnum (kontrollkomitén) vitjað Fróðskaparsetrið 19.5.05.** (J.nr. 0019-01601).

16. **Dagført yvirlit yvir nevndir, har Fróðskaparsetrið ger tilmæli, og aðrar nevndir, har Fróðskaparsetursfólk eru umboðað.** (J.nr. 0011-01075).

17. **Heilsanir til Fróðskaparsetrið á 40 ára degnum.** (J.nr. 0017-01551).

18. **Útgávur:**

    a. **Tinghellan – íkast til samfelagsliga orðaskiftið. Sosialurin 2005.**
    b. **Nordisk Sprogteknologi. Årbog for Nordisk Sprogteknologisk Forskningsprogram 2000-2004 og Treebanking in Northern Europe: A White Paper, Nordisk Sprogteknologi 2004. Museum Tusculanums Forlag 2005.**
    c. **Kultur historisk vegbok Hordaland, Hordaland Fylkeskommune, Bergen 1993 og Natur historisk vegbok Hordaland, Bergen Museum, Bergen 2005 - gávur við vitjanina hjá Høgskulen Stord/Haugesund.** (J.nr. 0012-01605).
    d. **FTS, Føroyskt TekstaSavn. Vegleiðing til skúlabrúks. Kirsti Hansen.**
    e. **SEV í orðum og tølum, ársfrágreiðing og ársroknskapur 2004.**
    f. **Betænkning om jurauddannelserne ved Københavns Universitet, Det juridiske Fakultet, Københavns Universitet.**
    g. **Universitetsliv 2004, ársfrágreiðing frá Københavns Universitet.**
    h. **Årsskrift 2005, Carlsbergfondet.**
    i. **Historisk kystkultur, en ressource i nutiden. Nord 2004:6, Nordisk Ministerråd - gáva við vitjanina hjá Kontrollkomité Norðurlandaráðsins.** (J.nr. 0019-01601).
    j. **Ny Herrnhut i Nuuk 1733-2003, Ilisimatusarfik 2003 og Grønlænder og Global – grønlandsk sprog, litteratur og medier i 25-året for Hjemmestyrets indførselse, Ilisimatusarfik 2004 - gávur frá Ilisamatusarfik í sambandi við, at Linda Linnert hevur verið á Fróðskaparsetrinum.** (J.nr. 0029-01585).
    k. **Bókagávur til Fróðskaparsetrið á 40 ára degnum: Faroe Islands Exploration Conference, Proceedings of the 1st Conference, edited by H. Ziska, T. Varming og D. Bloch – frá Jarðfrøðisavninum. Flokkssett Fuglar í Norðurhøvum, Søren Sørensen og Dorete Bloch og Føroysk Flora, Jóhannes Johansen, ritstjórn Anna Maria Fosaa og Sigga Rasmussen – frá Náttúrugripasavninum.** (J.nr. 0017-01551).
    l. **Ársroknskapur 2004, Tryggingarfelagið Føroyar.**
    m. **Årsberetning 2004, Danmarks Pædagogiske Universitet.**

Frágreiðing: Annika Sølvará